## Fundast um veðurlagið

Ísland er sera virkið á altjóða pallinum, tá talan er um broytingar í veðurlagnum og avleiðingarnar av teimum. Um vikuskiftið fer Ólafur Ragnar Grímsson (myndin), forseti, til Bangladesh , har ein stór ráðstevna um veðurlagsbroytingarnar verður í døgunum frá 26. til 30. august. Tað er lærdi háskúlin í Dhaka, sum skipar fyri ráðstevnuni saman við lærda háskúlanum í Ohio í USA. Umframt veðurlagsbroytingar og avleiðingar er matvøruframleiðsla á skránni.



## Fólkaatkvøða skal útsetast

Demokratiski flokkurin í Grønlandi heldur, at landsstýrið eigur at útseta ta ætlaðu fólkaatkvøðuna um sjálvstýri. Landsstýrið hevur sett fólkaatkvøðuna at verða tann 25. novembur, men Demokratarnir halda, at tað er alt ov stutt tíð til at fáa eitt alment orðaskifti um eitt so týðandi mál. Umframt útseting vilja Demokratarnir hava nýggjar samráðingar við danir, tí flokkurin er ikki nøgdur við tann búskaparliga partin av semjuni, sum varð gjørd fyrr í ár.

# Gongur ímóti fiskifrøðini

**Hóast fiskifrøðin mælir til í mesta lagi trý loyvi til veiði eftir stinglaksi, heldur fiskimálaráðharrin seg ikki ganga ímóti fiskifrøðini, at tveir lemmatrolarar aftrat hava fingið fyribilsloyvi at veiða stinglaks restina av hesum árinum**

STINGLAKSUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Niels Pauli (mynd) og Roc Amadour hava nú fingið fyribilsloyvi at veiða stinglaks – restina av hesum árinum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*- Eg meti meg ikki ganga ímóti fiskifrøðini, sigur Tórbjørn Jacobsen, sum man hava sæð í eyguni, hvat klokkan hevur sligið hjá lemmatrolarunum*
*Mynd: Vilmund Jacobse*

Fiskimálaráðið hevur givið tveimum lemmatrolarum aftrat, Niels Paula og Roc Amadour, fyribilsloyvi til at royna eftir stinglaksi tað, ið eftir er av hesum árinum.

Frammanundan hava tríggir aðrir lemmatrolarar, Suðringur, Phoeniks og Rasmus Effersøe, loyvi til at veiða stinglaks.

Úr Fiskimálaráðnum verður sagt, at Niels Pauli og Roc Amadour hava fingið hesi fyribilsloyvi, tí onkrir av fyrrnevndu ikki hava verið í vinnu.

Reiðarin á Suðringi, Marner Lisberg, hevur sagt, at pláss er ikki fyri fleiri skipum á stinglaksi og hevur fýlst á, at Fiskimálaráðið hevur givið hesi royndarloyvi aftrat restina av árinum.

Stinglaksur er djúpvatnsfiskur, sum fiskifrøðingar um okkara leiðir lítið vita um. Tí hava teir sagt, at ikki fleiri enn trý skip eiga at fiska hetta fiskaslag.

Sosialurin hevur leitað á heimasíðuni hjá Fiskirannsóknarstovuni eftir tilmælum um stinglaks, men vit hava einki funnið.

Hjalti í Jákupsstovu, leiðari á Fiskirannsóknarstovuni, heldur tað tykjast eitt sindur undarligt, at Fiskimálaráðið hevur givið tvey fyribilsloyvi aftrat og vísir annars til Jákup Reinert, sum í løtuni er umborð á Magnusi Heinasyni.

Tá vit ringdu til Jákup Reinert í morgun, hevði hann frívakt og var í koyggjuni.

Tað eru eisini tey, sum halda tað vera løgið, at Tórbjørn Jacobsen, sum í málinum um fiskidagar mælti til at fylgja fiskifrøðisligu ráðgevingini, nú gevur hesi royndarloyvi útyvir tey trý, sum eru frammanundan, og sum Fiskirannsóknarstovan mælir til.

### Fylgja tilráðing

Tórbjørn Jacobsen sigur, at Fiskimálaráðið júst fylgir fiskifrøðiligu tilráðingini um, at trý skip kunnu vera á stinglaksaveiði.

- Av teimum trimum skipunum, sum hava loyvi at veiða stinglaks, hava tvey teirra ligið í so nógvar mánaðir í ár, og lítið bendir á, at tey fara á hesa veiði tað, ið eftir er av hesum árinum.

Landsstýrismaðurin leggur dent á, at fyribilsloyvi, sum Niels Pauli og Phoenix nú hava fingið, bert er galdandi restina av hesum árinum.

- Nú støðan hjá lemmatrolarunum er so døpur, og hesi skip hava søkt Fiskimálaráðið um fyribilsloyvi, samstundis sum tvey av verandi loyvum liggja óbrúkt, hava vit gingið umsóknini á møti.

Tórbjørn Jacobsen vísir á, at tað er ikki so einfalt hjá Fiskimálaráðnum at fara eftir loyvum, sum liggja óvirkin, og tá tað er ein veruleikin, at bert Suðringur gera nakað við stinglaksin í løtuni, gjørdu vit av at lata Niels Paula og Roc Amadour fyribilsloyvi restina av hesum árinum.

- Skipanin við øllum fimm loyvunum at veiða stinglaks er, at tey ganga út, tá árið er úti, sigur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum.

# Eftirlitið við pelagisku veiðini styrkjast

**- Eg haldi, at vit skulu taka málið um møguliga hjáveiði hjá pelagisku skipunum í allar størsta álvara, men neyðugt er, at Fiskiveiðieftirlitið fær nakað av peningi at gera neyðugar kanningar fyri, sigur landsstýrismaðurin, sum heldur, at neyðugt eisini er at útbyggja og styrkja eftirlitið á landi**

HJÁVEIÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eitt mál, sum var nógv frammi undir viðgerðini av fiskidøgum, var møgulig hjáveiða hjá pelagisku skipunum, sum fiska í føroyskum sjógvi.

Í tíðini hjá Bjørn Kalsø, fyrrverandi landsstýrismanni í fiskivinnumálum, varð eitt skifti nógv gjørt burtur úr møguligari hjáveiði hjá hesum skipum, sum fiska í føroyskum sjógvi. Fjølmiðlarnir settu eisini fokus á hetta mál, sum fekk drúgva umrøðu á tingi. Við tíðini fjaraði málið burtur aftur, og síðan hevur stórt sæð verið tøgn.

Nú fiskidagarnir fyri komandi fiskiár aftur skuldu ásetast, tók spurningurin um hjáveiði hjá pelagisku skipunum seg uppaftur, og ikki minst vóru tað vinnunevndarumboð sum løgdu dent á, at málið má kannast til botns.

Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sigur, at hann fer at taka stig til at finna út av, um "myturnar" um hesa møguligu hjáveiði hava nakað upp á seg ella ikki, og sjálvur sigur hann seg taka hetta mál í stórum álvara.

- Eg kann ikki siga við vissu, hvussu er og ikki, men eg havi skilt, at fitt av hjáveiði – serliga kongafiski og upsa – onkuntíð hevur verið uppí veiðini hjá pelagisku skipunum, men eg havi ikki hoyrt nógvar søgur um hjáveiði av toski.

Landsstýrismaðurin sigur, at hetta mál varð rættiliga nógv frammi í tinginum undir viðgerðini av fiskidøgum, og løgtingið vísti undir orðaskiftinum stóran áhuga í, at málið verður kannað.

- Fiskiveiðieftirlitið hevur staðið í stað í játtan í fleiri ár, samstundis sum uppgávurnar eru vorðnar fleiri – eisini uppgávur í sambandi við millumtjóða avtalur.

Tórbjørn Jacobsen sigur seg vóna, at løgtingslimir fara at taka líka væl undir við at játta Fiskiveiðieftirlitinum neyðugu fíggjarligu karmarnar, sum teir undir viðgerðini av fiskidøgum løgdu dent á, at neyvari eftirlit eigur at verða við veiðini hjá føroysku og útlendsku skipunum, sum fiska uppisjóvarfisk í føroyskum sjógvi.

- Eg haldi, at vit skulu taka hetta málið í allar størsta álvara, men neyðugt er, at Fiskiveiðieftirlitið fær nakað av peningi at gera hesar kanningar fyri, sigur landsstýrismaðurin, sum heldur, at neyðugt eisini er at útbyggja og styrkja eftirlitið á landi.